### Vestmanna: Minni skattur í apríl

Meðan flestu grannakommununnar høvdu framgongd í inntøkunum, gjørdi hetta sama seg ikki galdandi í Vestmanna.

Kommunuskatturin í farna mánaði var nakað minni enn sama mánað í fjør, vísa hagtøl frá Vestmanna kommunu.

Í fjør fekk kommunan góðar 2,7 mió krónur inn í skatti, meðan skatturin í ár var 86.500 krónur minni. Hetta svarar til eina skattainntøku uppá 2,69 mió krónur.

- Orsøkin til minkingina er óivað hon, at onki arbeiði er á fiskavirkinum í løtuni, vísir kommunan á.

### Tvey hátíðarhald í einum

Leygardagin verða ikki færri enn tvey størri tiltøk hildin í Skálavík – avdúking av minnisvarða og vígsla av einum frítíðar- og skeiðsdepli.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at byggja henda stóra depilin í Skálavík, og nú er komið so langt, at hann verður tikin alment í nýtslu.

Hetta verður gjørt seinnapartin leygardagin, samstundis sum ein minnisvarði av Eileri Jacobsen verður avdúkaður.

Hátíðarhaldið byrjar kl. 14, tá borgarstjórin í Skálavík, Linjohn Christiansen, fyrrverandi tingmaðurin Óli Breckman og vinnulívsmaðurin Olaf Olsen halda røðu. Síðani verður minnisvarðin avdúkaður av Eileri, sum saman við konuni hevur latið frítíðar- og skeiðsdepilin byggja.

Aftaná hesa avdúkingina verður farið inn í sjálvan depilin, har fyrst landsstýrismaðurin í vinnumálum, Johan Dahl letur depilin alment upp, meðan einkjan eftir Eiler, Beinta H. Jacobsen klippir snórin.

Aftaná verður hátíðarhald við sangi, røðum og tónleiki í høllini, eins og fólk fáa høvið at hyggja nærri at deplinum.

## Eitt valhøli heldur enn tvey



Tá fólk í Vága kommunu næstu ferð skulu á val, verður tað gjørt á einum og sama staði.

Higartil hevur tað verið so, at fólk í Sandavági hava valt í hesi bygdini, og tey í Miðvági og Vatnsoyrum á einum og sama staði í Miðvági.

Men soleiðis verður ikki longur.

Á bygdaráðsfundi í Vága kommunu hósdagin í farnu viku varð samtykt at hereftir verður ítróttarhøllin á Giljanesi valhøli í kommununi, ið fevnir um tær tríggjar nevndu bygdirnar.

Fíggjarnevndin hevði frammanundan sagt gott fyri uppskotinum, og tað gjørdi bygdaráðið eisini á fundinum.

Spurningurin er so, um henda nýggja skipanin skal roynast fyrstu ferð við eitt løgtingsval ella eitt fólkatingsval. Í øllum førum er greitt, at innanfyri teir komandi sjey mánaðirnar skulu føroyingar velja umboð til løgtingið og til fólkatingið.

# Nú fær Mikkjal standmynd

**MENTAN** Sunnudagin 10. juli verður standmynd av mentamanninum Mikkjal á ryggi avdúkað í Miðvági



Snorri Brend

Fyri einum ári síðani vóru stig tikin til at savna inn pening til at reisa eina tílíka standmynd. Arbeitt hevur samstundis verið við at finna eitt egnað øki til standmyndina.

Avgerð er nú tikin um, at standmyndin skal standa út ímóti vegnum, á staðnum tey nevna í Beitinum, har Mikkjal varð føddur og vaks upp.

Her kemur standmyndin at standa sera væl fyri, tá hugsað verður um atkomumøguleikar og møguleikar at seta bilin frá sær.

Umframt hetta er eisini ætlanin at fríðka um urtagarðin í Beitinum. Á henda hátt verður økið at meta sum ein part, higar fólk kunnu vitja og taka sær av løttum.

Í sambandi við verkætlanina um standmyndina, eru allir partar, ið ávirkaðir verða, hoyrdir. Avtala er gjørd við grannar um økið, har standmyndin verður sett, eins og samstarv eisini er við Vága Dansifelag um garðin og túnið kring húsini í Beitinum.

# Fundast um kóp og grind

**NAMMCO** Fyrrapartin í gjár hittist Vísindanevndin hjá NAMMCO til árliga arbeiðsfundin. Hesaferð eru Føroyar vertir fyri fundinum, sum er við Gjógv

Snorri Brend

Hesar komandi dagarnar skulu vísindafólk fyri hvalaveiðutjóðirnar í Norðuratlantshavninum leggja fram hagtøl, stovnsmetingar og annað.

Fundurin í gjár byrjaði við at vísindafólkini gingu ígjøgnum ársfrágreiðingina um støðuna hjá millum annað kópi og hvali í Norðurhøvum.

Á fundinum eru tey tíggju fólkini í vísindanevndini, har millum annað lívfrøðingurin Bjarni Mikkelsen úr Føroya Náttúrugripasavni situr. Í ár eru somuleiðis tveir eygleiðarar við – annar úr Russlandi, hin úr Japan.

Tað, sum kemur burturúr arbeiðsdøgunum í Gjógv hesa vikuna, skal ætlandi setast í eina frágreiðing,. Henda verður síðani løgd fram á ársfundinum hjá NAMMCO, sum verður í Oslo frá 12. til 15. september.

Hóast nógv er á skránni á fundinum, er eingin ivi um, at fundurin hevði verið lagdur niður, um boðað varð frá grindadrápi onkustaðni.



*Bjarni Mikkelsen er føryskt umboð á NAMMCO fundinum við Gjógv*